# Tax-free bíligari á flogi enn á sjógvi

**Ein kartong av sigarettum er 40 krónur dýrari umborð á Norrønu enn umborð á Atlantic Airways. Harafturímóti er lítil munur á prisunum hjá FaroeJet og Atlantic Airways. Sosialurin hevur kannað tax-free prísir og samanborið við Kastrup og í handlum í Føroyum**

TAX-FREE
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Summarið nærkast, og tey flestu av okkum ætla ein túr uttanlands. Í hesum høpi keypa vit ofta tax-free. Men er tað so bíligt, sum vit halda? Og er tað so nógv dýrari í Kastrup enn umborð á flogførunum? Hesar spurningar vildu vit hava svar uppá og hava tí gjørt eina kanning av tax-free prísunum.

### Prísirnir næstan teir somu

Tað er týðuligt, at FaroeJet hevur skeitt eftir príslistanum hjá Atlantic, tá tey settu sínar tax-free prísir. Tey hava ikki somu vørurnar, men nógvir av stórseljarunum sum Baileys og Matador Mix eru at finna í báðum príslistum. Prísmunurin er lítil millum vørurnar, ið eru tær somu hjá báðum, og ikki ber til at staðfesta, at annar er dýrari enn hin. Roknar ein í prosentum av vørunum vit hava valt út, er Atlantic tó 4 prosent bíligari enn FaroeJet.

### Dýrari í Kastrup

Millum fólk tykist tað verða ein vanlig fatan, at tað er dýrari at keypa í Kastrup enn umborð á flogfarinum. Hetta vísir seg eisini at passa væl, tá vit samanbera prísirnar, men munurin er ikki serliga stórur.

Til dømis kostar ein 50 cl fløska av Smirnoff 55 krónur umborð á Atlantic, 50 krónur umborð á FaroeJet og 55 krónur í Kastrup. Lacoste parfuman Touch of pink kostar 295 krónur hjá Atlantic, 280 krónur hjá FaroeJet og 305 krónur í Kastrup.

Ofta hevur Kastrup størri vørueindir, sum vit so hava roknð um til somu eind sum umborð á flogførunum. Hetta kann eisini hava við sær, at prísurin verður nakað lægri í Kastrup, eftirsum prísurin ofta lækkar við størri vørueind.

### Hægri prísir í Norrønu

Norrøna er einasti bátur, sum siglur uttanlands úr Føroyum við ferðafólki, og er tað kanska tí, at prísirnir umborð á Norrønu eru hægri enn umborð á flogførunum. Heldur ikki har eru vørurnar akkurát tær somu, men summi ting eru at fáa bæði á flogi, í báti og í floghavnini. Eitt sovorið er tað vælumtókta ginnið Bombay Saphire. Tað kostar 60 krónur hjá bæði Atlantic og FaroeJet , 69,50 umborð



*Við lokkandi príslistum royna feløgini at fáa okkum at brúka pening umborð á teirra førum.*

á Norrønu og 60 krónur í Kastrup.

Plássið er avmarkað umborð á einum flogfarið, og tí eru øl og vínfløskur ikki at finna umborð á teimum báðu flogfeløgunum. Tað er at fáa umborð á Norrønu, og har eru prísirnir lágir, men tó er bara 20 krónur á muni á prísinum á seks Føroya Bjór Gull í Rúsuni og umborð á Norrønu. Carlsberg Hof kostar 32 krónur umborð, 37,95 krónur í Kastrup og 55,75 í Rúsuni.

### Dýrari á landi

Vit hava eisini tikið tað við, hvat tað kostar at keypa hesi ting í einum vanligum handli í Føroyum. Grundin til hetta er ikki fyri at vera órein móti handlunum her, men fyri at síggja, hvussu stórur munurin er. Aðrastaðni í verðini hevur ein sæð, at summar vørur kosta minni á landi enn tær gera umborð. Hetta er av tí at feløgini, sum seta tax-free prísirnir seta teir alt ov høgar og stappa ov nógvan pening í egnan lumma.

Nógvir gávulutir eru eisini at finna í tax-free príslistunum, men eftirsum feløgini hava so ymisk merki ber ikki til at gera eina rættvísa samanbering av

## FAKTA




**SOLEIÐIS HAVA VIT GJØRT KANNINGINA**

Vit hava savnað príslistar frá Atlantic Airways, FaroeJet og Smyril Line saman. Hugt at prísum á heimasíðuni hjá Kastrup floghavnini, ið er www.tax-free.dk og ringt runt til tilvildarligar handlar í Føroyum, sum selja tað sama, ið er at finna í tax-free príslistunum.

Vit hava valt at bara samanbera somu merki, so at kanningin skal verða so rættvís sum gjørligt. Feløgini hava nógv ymisk merki og bara nøkur fá til felags, tí hevur ikki borið til at gera kanningina størri enn hon er.















| VØRUR | ATLANTIC AIRWAYS | % Bíligari enn á landi | FAROEJET | % Bíligari enn á landi | SMYRIL LINE | % Bíligari enn á landi | KASTRUP | % Bíligari enn á landi | FØROYAR |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **SPIRITUS** | | | | | | | | | |
| Baileys 50 cl 17% | 75 kr | -45% | 80 kr | -42% | hava ikki | | 76,95 | -44% | 137,32[1] |
| Smirnoff 50 cl 40% | 55 kr | -63% | 50 kr | -67% | hava ikki | | 54,95 | -63% | 149,82 |
| Otard Cognac 40% 50 cl | 130 kr | -46% | 125 kr | -48% | 139,50 kr[2] | -42% | 139,95 | -42% | 240,71 |
| Bombay Saphire 50 cl | 60 kr | -67% | 60 kr | -67% | 69,50 kr[3] | -62% | 60 kr[4] | | 181,43 |
| Carlsberg Hof 6 pack | hava ikki | | hava ikki | | 32 kr | -43% | 37,95 kr | -32% | 55,75 kr |
| Føroya Bjór Gull 6 pack | hava ikki | | hava ikki | | 42 kr | -32% | hava ikki | | 62 kr |
| **SIGARETTIR** | | | | | | | | | |
| Look 200 stk. | 170 kr | -60% | 185 kr | -57% | 210 kr | -51% | 199,95 | -53% | 429,5 |
| Prince 200 stk. | 170 kr | -60% | 185 kr | -57% | 210 kr | -51% | 199,95 | -53% | 429,5 |
| **TIL KVINNUR** | | | | | | | | | |
| Be Delicioous DKNY 50 ml | hava ikki | | 270 kr | -48% | 299 kr | -42% | 280 kr | -46% | 515,00[5] |
| Lacoste Touch of Pink50 ml | 295 kr | -49% | 280 kr | -52% | hava ikki | | 305 kr | -48% | 581,67 |
| **TIL MENN** | | | | | | | | | |
| Boss Soul Edt 50 ml | 250 kr | -43% | hava ikki | | hava ikki | | 289 kr | -34% | 439,00 |
| JPG Le Male 75 ml edt | hava ikki | | 250 kr | -24% | hava ikki | | 269 kr | -18% | 329,40[6] |
| **GÓÐGÆTI** | | | | | | | | | |
| Haribo Matador Mix 500 g | 25 kr | -50% | 25 kr | -50% | 24 kr | -52% | 39 kr | -22% | 49,88[7] |
| M&Ms Peanuts 400 g | 30 kr | -70% | hava ikki | | 33 kr | -67% | 42,95 kr | -57% | 99,80[8] |
| **BÍLIGARI ENN Á LANDI** | | **-55%** | | **-51%** | | **-49%** | | **-45%** | |

[1] Fløskurnar í Rúsuni eru 70 cl so vit hava rokna tað um til 50 cl. [2] 100 cl fløska kostar 279 kr. [3] 100 cl fløska kostar 139 kr. [4] 100 cl fløska kostar 119,95. [5] Parfumufløskurnar í handlinum í Føroyum eru 30 ml so tað hava vit rokna um til 50 ml. [6] JPG Le Male var 125 ml í handlinum í Føroyum so tað hava vit rokna um til 75 ml. [7] Haribo Matador Mix var 200 g í handlinum í Føroyum so tað hava vit rokna um til 500 g. [8] M&Ms peanuts var 100 g í handlinum í Føroyum so tað hava vit rokna um til 400 g.